# « skal standa




*- Innrætting og litir kunnu ávirka okkum sálarliga og arbeiðsliga. Allastaðni snýr tað seg um at nøra um trivnaðin, bæði hjá starvsfólki og viðskiftafólki. Er ein handil innbjóðandi at koma í, økir tað eisini um keypihugin hjá fólki. Men tað nyttar einki, at rúm eru vøkur, um tey ikki kunnu brúkast í gerandisdegnum, sigur innanduraarkitekturin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Fjølbroyttar uppgávur

Hóast Gunnbjørg longu hevur havt fleiri uppgávur í síni frítíð, bæði størri og smærri, er tað ikki fyrr enn nú, at hon veruliga bjóðar seg fram.

- Í løtuni eri eg hjá Svend Krosstein, sum skjótt fer at lata upp í nýggjum hami. Mín uppgáva er at koma við hugskotum, tosa við handverkarar og onnur og seta tey í gongd, soleiðis at endamálið at geva handlinum eitt nýtt andlit, verður rokkið.

Hon hevur eisini givið móttøkuni hjá Føroya Lívstrygging eina andlitslyfting – bert fyri at nevna nakrar av teimum uppgávum, hon hevur havt.

- Arbeiðið hjá einum innanduraarkitekti spennir rættiliga víða. Talan kann vera um innrætting, skilaveggir, val av innbúgvi, plasering av møblum, lampum, uppheingjan av málningum og myndum, vindeygapynt og litir.

Gunnbjørg heldur ikki, at munurin at innrætta eitt ellisheim ella ein stovn – og so at innrætta eitt privatheim, er so stórur.

- Proseduran er hin sama; tað er bara hvør sín mátistokkur.

Hon vísir á, at arbeiðið hjá einum innanduraarkitekti og hjá einum dekoratøri liggur so mikið tætt, at hon eisini bjóðar seg fram at pynta handilsvindgeygu – ikki minst, nú jólastákanin fer at nærkast.

## Hevur stóra ávirkan

Gunnbjørg sigur, at tað hevur stóra ávirkan á okkum menniskju, hvussu rúm eru innrættað, og hvørjir litirnir eru.

- Hesi viðurskifti kunnu ávirka okkum sálarliga og arbeiðsliga. Allastaðni snýr tað seg um at nøra um trivnaðin, bæði hjá starvsfólki og viðskiftafólki. Er ein handil innbjóðandi at koma í, økir tað eisini um keypihugin hjá fólki. Men tað nyttar einki, at rúm eru vøkur, um tey ikki kunnu brúkast í gerandisdegnum.

Hon vísir á, at læran hjá einum innanduraarkitekti so sanniliga ikki bara snýr seg um litir.

- Hetta er nevniliga ein lítil partur av øllum. Vit læra bæði um bjálving, ventilatión, el, ketlar, oljufýr, byggitilfar og mangt, mangt annað.

Men, leggur hon aftrat:

- Tað er eisini neyðugt, at tú heldur teg dagførdan við at lesa um bygging og innrætting, hyggja at ymiskum tilfari, sum er á marknaðinum og annars kunna teg um tað, sum nú einaferð rørist á økinum.

Nú so nógv verður tosað um dýra olju, kunnu vit leggja aftrat, at Gunnbjørg hevur sjálvreinsandi og orkusparandi vindeygu í húsunum í Vestmanna, sum hon hevur góðar royndir við.

## Ymisk arbeiði og tó...

Hon hevur arbeitt í fleiri ár hjá Termovirkinum, og hon hevur eisini starvast hjá Per á Hædd.

- Sjálvt um hesi arbeiði ikki hava havt beinleiðis tilknýti til mína útbúgving, havi eg kortini lutvíst kunnað brúkt útbúgvingina, tá ið ræður um eitt nú vindeygu, rútar og myndir, og somuleiðis havi eg sum sagt havt møguleikan at arbeitt við ráðgeving og vegleiðing í míni frítíð, sigur Gunnbjørg Gunnbjørgsdóttir, innanduraarkitektur, sum annars er at hitta á fartlf. 258543

# Skipini fáa frægari prís fyri upsan

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri skrivaðu vit, at beinfrítt og skræðuleyst upsaflak lá í diskunum í Miklagarði í SMS fyri góðar 66 krónur fyri kilo. Hetta er upsi, sum er komin úr Danmark, men er veiddur í Norðuratlantshavi.

Í greinini váttaði slaktarin í SMS, at hetta var prísurin, og hann legði aftrat, at flak úr lýsingi, sum danir rópa kulmule, eisini lá fyri sama kiloprís.

Onkur fiskaseljari fekk ilt av, at vit søgdu, at upsaprísurin í Føroyum hevur ligið millum 2 og 4 krónur fyri kilo av ráfiski, tí í dag er upsaprísurin hægri enn tað.

Veruleikin er, at prísurin á upsa, landaður í Føroyum, var rættiliga lágur, áðrenn russar komu higar til lands at keypa heilan og smáan upsa.

Ragnar S. Olsen, reiðari hjá P/F Beta, sigur, at upsaprísurin í dag liggur millum 4,50 og 5,00 krónur kilo, men hann leggur aftrat, at tað er ikki so langt síðan, at prísurin fór yvir tær fýra krónurnar fyri kilo.

- Sum eg havi skilt á fiskakeyparum, er marknaðarstøðan orsøkin til, at prísurin er kvinkaður uppeftir. Eg havi skilt, at minni av alaska polloc er á evropeiska marknaðinum – bæði tí, at fiskiskapurin er minni og tí, at amerikumenn keypa meira og meira av fiskinum. Tí kemur minni á evropeiska marknaðin, og tí verður upsaprísurin minni trýstur í løtuni.

Ragnar S. Olsen heldur, at tað saktans eisini kann hava havt sína ávirkan á prísin, tá ið føroyskir fiskakeyparar tíðliga í summar sóu, at ein marknaður er fyri upsa eystanfyri.

- Vit sluppu av við stórar nøgdir av smáum upsa fyri væl betri prís, enn føroysku virkini kundu bjóða. Tað kann eisni hava havt sína ávirkan, sigur Ragnar S. Olsen, reiðari, sum annars fegnast um, at upsaprísurin er vorðin betur aftur.